Kunningarstovan fær arbeiðsfrið

Eftir nýggju Reglugerðini fyri Ferðavinnuna í Eysturoy verður tað munandi lættari hjá Kunningarstovuni at arbeiða. Runavíkar Kommuna hevur átikið sær at gjalda tað, Kunningarstovan í Saltangará kostar at reka. Samstundis verður Kunningarstovan nærri knýtt at kommununi

FERÐAVINNA
Edvard Joensen

Náttúran er tað, sum í stóran mun hugtekur ferðamannin
Mynd: Edvard Joensen

Saltangará: Runavíkar Kommuna hevur átikið sær at rinda eitt størri gjald enn higartil til raksturin av Eysturoyar Kunningarstovu. Tað ger Kunningarstovuna væl betri føra fyri at arbeiða við ferðavinnuni burturav heldur enn at nýta tíð og orku upp á at fáa til vega pening til raksturin.

Ferðavinnan í Eysturoy hevur fingið nýggjar viðtøkur, sum millum annað bera í sær, at kommununrnar, har kunningarstovurnar báðar húsast, gjalda tað, sum svarar til raksturin av kunningarstovunum. Aftur fyri eru borgarstjórarnir í vertskommununum báðum føddir nevndarlimir hjá Ferðavinnuni í Eysturoy. Kunningarstovurnar eru í Fuglafirði og í Saltangará.

Fuglfirðingar altíð stuðlað

Í veruleikanum merkir tað ikki tann stóra munin fyri Fuglafjarðar Kommunu, sum higartil hevur stuðlað Kunningarstovuni munandi, meðan Runavíkar Kommuna nú fer at gjalda væl meira enn higartil til Kunningarstovuna.

– Tað er kortini ein treyt, at Kunningarstovan skal vera fyri alla oynna, sigur leiðari á Kunningarstovuni í Saltangará, Rannvá Troest.

Hóast Kunningarstovan í Saltangará í framtíðini fer at verða beinleiðis bundin av Runavíkar Kommunu, er hon tó undir Ferðavinnuni í Eysturoy, sum er almenni arbeiðsgevarin. Tað vil siga, at hon fer at virka sum ráðgevi hjá allari ferðavinnuni, sum higartil hevur verið.

– Men tó við teirri broyting, fegnast leiðarin á Kunningarstovuni í Saltangará um, at nú fer at bera til hjá okkum at brúka okkara tíð upp á sjálva vinnuna og at menna teir møguleikar, vinnan hevur at bjóða, heldur enn at brúka tíð og orku upp á at finna pening til at reka stovuna fyri.

Hon letur at, at undanfarin ár hevur Kunningarstovan í Salangará mestsum livað eina »bingotilveru«, sum hon tekur til.

Hóast vertskommununrnar rinda fyri raksturin av kunningarstovunum, er tað kortini ikki so, at hinar kommununrnar, sum við eru í Ferðavinnuni í Eysturoy, ikki eisini gjalda til vinnuna. Tí tað gera tær avgjørt sigur Rannvá Troest.

Vinnan burturav

Tann tryggleikin, Kunningarstovan nú hevur fingið, ger, at til ber at taka sær av vinnumenning burturav. Tað fer so aftur at gera, at kommununrnar í Eysturoynni fáa meira nyttu burtur úr Kunningarstovuni enn higartil.

Ferðavinnan í Eysturoy fer í næstum at senda ein nýggja Eysturoyarfaldara á marknaðin, har nógv tilboð eru til feðramannin, sum vitjar oynna.

Eysturoyar Gongufelag hevur longu gjørt ein faldara, sum komin er út.

Ferðavinnan í Eysturoy hevði aðalfund mikukvøldið, har millum annað tveir nýggir nevndarlimir vórðu valdir.

Í nýggju nevndini sita Sigurð Simonsen, borgarstjóri í Fuglafirði, Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavík, sum er føddir limir. Kjartan Dalsgaard, umboðandi skótadepilin á Selatrað, Hallbera Christiansen í Gøtu, og Bernhard Jacobsen av Eiði.

Hallbera Christiansen varð afturvald, meðan Bernhard Jacobsen er nývaldur. Hinir tríggir nevndarlimirnir stóðu ikki fyri vali.

Tveir tiltakslimir vórðu nývaldir, og eru tey Tummas Mikal Jacobsen á Skála og Josefina Jacobsen á Toftum.

Nýggj turkilinja í Leirvík

Á turkivirkinum Faroe Marine Products í Leirvík verður ein umfatandi útbygging framd um vikuskiftið. Ein hátøknilig turkilinja verður sett upp, og tað fer at gera úrtøkuna betri, væntar virkisleiðslan

FISKIVINNA
Edvard Joensen

Høvdini verða løgd á plastristir at turka
Mynd: Edvard Joensen

Leirvík: Nýggja turkilinjan fer at gera framleiðsluna meira rentabla, sigur Eirikur á Húsamørk, stjóri á Faroe Marine Products, sum turkar fiskaslógv til útflutnings.

Tað luktar ræst. Rættiliga strammur luktur kemur frá hesum høvdunum, sum liggja á plastikristunum klár at fara í turkiovnarnar ella beint komin útaftur.

Tað arbeiða 35 fólk fast á virkinum. Umframt eru fleiri, sum arbeiða av og á, eitt nú skúlanæmingar, sum arbeiða eftir skúlatíð.

Fram við vegginum øðrumegin í stóru høllini standa fólk, tvey og tvey við ristunum millum sín, og leggja upsa- og torkarhøvd á ristirnar við hond. So hvørt sum fult er, verða ristirnar stakkaðar longri úti á gólvinum, og tá stakkurin er nóg høgur, verður hann fluttur burtur at seta inn í ovnin.

Hendan arbeiðsgongdin fer at gerast lættari, tá nýggja linjan er uppsett, sigur stjórin á virkinum.

Talan er um eina íløgu upp á knappar tvær milliónir, greiðir Eirikur á Húsamørk frá, meðan hann vísir fram arbeiðsgongdina á virkinum. Linjan, sum sett verður upp, er gjørd í Íslandi og er fyrsta av sínum slag.

Íslendski samstarvsfelagin hjá Faroe Marine Products hevur keypt tríggjar tílíkar linjur, og hendan sum teir senda hendanveg, er tann fyrsta, sum verður sett upp. Hon hevur verið roynd í Íslandi, og riggaði væl, láta teir at.

Linjan fer at gera tað nógv arbeiðsligari á virkinum. Hon flytir høvdini eftir bandi og vigar so hvørt, soleiðis, at bara tann málda nøgdin kemur út til hvørja ristina, har tey skulu leggjast á til turkingar. Neyðugt verður heldur ikki við so nógvari lyfting og flyting, sum gjørt verður í dag. »Flowið« fer at verða betri, sigur stjórin.

Sum er flytur bandi bara høvdini, og so mugu tey, sum leggja á ristirnar sjálv syrgja fyri at hava neyðugu nøgdirnar tøkar. Av tí sama liggja rúgvur á bandinum og kunnu gera tað eitt sindur óarbeiðsligt.

Tey turka umleið 40 tons um dagin í Leirvík. Onkran dag eru tey komin upp móti teimum halvthundrað tonsunum. Talan er um høvd og ryggir.

Turkaða slógvið verður pakkað og sent til Nigeria, har tað verður bloytt og kókað til súpanarsoð.

Eirikur á Húsamørk sigur, at undirtøkan frá føroysku virkjunum hevur verið góð, síðan byrjað varð. Øll tey smáu virkini lata alt slógvið til Leirvíkar, sigur hann.

Turkaðu høvdini eru komin úr aftur ovnunum, og tveir mans standa við eina slisku og stoyta av ristunum.

Høvdini renna niður í stórar kassar í niðaru høllini, har tey verða pakkað í sekkir og løgd á plattar. Klár at verða avskipað til Nigeria at enda sum bót í høvdasúpan.

Haran herjar urtagarðar

Haran er løgst í urtagarðarnar í Leirvík. Nú bygdin er vetrarfriðað, og seyðurin burturvístur, hevur urtagarðsfólkið í Leirvík fingið nýggja plágu at dragast við

ONNUR PLÁGAN
Edvard Joensen

Smáir runnar og annar vøkstur, sum stóð upp úr kavanum, eru bitin niður á slætt av haru
Mynd: Edvard Joensen

Leirvík: Hara er løgst í urtagarðarnar Úti á Sýn í Leirvík. Alt, sum stingur upp úr kavanum, verður gnagað. Urtagarðseigararnir ugga seg við, at tær munnu fara at rýma aftur, tá tað fer at toya.

Tíggju vóru Egyptalands plágur. Í Leirvík eru tey nú farin undir nummar tvey. Eftir at seyðurin er útvístur úr bygdini, hava urtagarðarnir Úti á Sýn fingið aðra pláguna at dragast við. Harur, sum av svongd eru lagstar á tað, sum upp úr kavanum veksur.

Haran er mest at síggja, tá myrkt er. Seint á kvøldi hætta tær sær at húsum at vita, um eitthvørt bítandi fæst.

Úti á Sýn hava tær funnið út av, at tað standa nakrir smáir runnar upp úr kavanum. Og teimum hava tær so etið av, greiðir Kristian á Reynatrøð frá.

Hann hevur seinastu seks árini búð í býlinginum ytst í Leirvík, men sigur seg ikki fyrr hava sæð haru soleiðis millum húsini.

Ikki ivast hann í, at tað er kavin, sum noyðir tær at koma so nær at húsum.

–Fittar eru tær, og synd er í teimum, heldur hann, men harmast kortini um, at tað, sum sett er niður, ikki fær vaksið í frið. Men har gerst einki annað enn at rópa eftir teimum og royna at forskrekkja tær, tí ikki er loyvt at skjóta, vísir hann á.

Hann sigur, at hann hvønn dag nú seinnu tíðina, bæði morgun og kvøld, hevur sæð haru uttan fyri. Ongantíð fleiri í senn, so ilt er at siga, um tað eru fleiri, ella tað bara er tann eina, sum er so nøsk, at hon etur alt, sum kemur undan kavanum í grannalagnum.

–Hon fer allastaðni, eisini har, stroyptur garður er fyri, sigur Kristian á Reynatrøð. Leggur á smáu runnarnar og gnagar teir niður at vøllinum. Eru so einstakar páskaliljur ella annar vøkstur, sum stingur høvdið undan, fær tað sama umgang.

Tey, sum hava urtagarðar í Leirvík, fegnaðust annars um, bygdin nú var vetrarfriðað, so seyðurin ikki slapp at vøkstrinum, tey høvdu sett niður.

Men at tey skuldu fáa trupulleikar av haru millum húsini, hevði helst eingin væntað, sigur Kristian á Reynatrøð, sum nú, eins og grannarnir, hevur enn eina orsøk til at gleða seg til lýggjara várið.

Í dag hava vit opið frá
kl. 10.00 til 14.00
Í hesum sambandið hava vit nógv
góð brúktbilatilboð m.a. hesi:

Hyundai Accent 1,3 LS 5H
km. 65.000, árg. feb. 1999
75.000,-

Mazda E2200 Vøruvognur
km. 91.500, árg. mars 1997
90.000,-

Peugeot 306 D 4H
km. 150.000, árg. apr. 1995
80.000,-

Seat Cordoba 1,9 SDi STC. 5H
km. 35.500, árg. aug. 1999
115.000,-

VW LT31 vøruvognur 2,4D
km. 148.000, árg. okt. 1993
49.000,-

VW BORA 1,9 TDI
km. 73.000, árg. jan. 2000
170.000,-

Citroen Xantia 1,9 TD 5H
km. 94.000, árg. okt. 1996
115.000,-

Citroen Xantia II 2,0 HDi stc. 5H
km. 52.500, árg. nov. 1999
165.000,-

Citroen Jumpy 1,9TD 8 ferðandi
km. 28.200, árg. mars 2000
190.000,-

Citroen Xantia II 2,0 HDi stc. 5H
km. 100.000, árg.sept. 1999
150.000,-

Citroen Berlingo 1,9D vøruvognur
km. 29.500, árg. febr. 2000
105.000,-

Citroen Xantia Exclusive 3,0 V6
km. 62.500, árg. juni 1998
165.000,-

Citroen Xsara 2,0 HDi stc. 5H
km. 83.000, árg. juni 1999
140.000,-

Citroen ZX 1,4i 5H
km. 105.000, árg. aug. 1995
70.000,-

Citroen Xsara 2,0 HDi 5H
km. 20.000, árg. sept. 1999
153.000,-

CITROËN
Mercedes-Benz
MITSUBISHI MOTORS

Møguleiki er eisini at royna nýggjar bilar

Vælkomin til
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo